**Nr. 17/2018**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um teldutøka savnið hjá Beta files, settur landsstýrismanninum í mentamálum, Rigmor Dam (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Er nøkur gransking byrjað?
2. Hvørji stig hevur landstýrismaðurin tikið til tess at kunna um og seta gongd á granskingina og harvið fremja Løgtingsins vilja at byrja fiskivinnugransking í teldutøka tilfarinum hjá Beta files?

**Viðmerkingar:**
Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2018 er ein millión kr. sett av á konto 7.23.6.25 undir yvirskriftini Fiskivinnusavnið Beta (Stuðulsjáttan).

Endamálið við játtanini er at stuðla gransking í tilfari frá partafelagnum Beta um felagsins virksemi, sum er savnað og skrásett frá 1977 til 2006.

Neyvan nakrantíð hevur slíkur granskingarmøguleiki staðið føroyingum í boði, har øll kunning fæst um raksturin hjá einum felag, ið fevndi um raksturin av 8 partrolarum í 3 áratíggju. Her er kunning um m.a. øll troløki, tov, troltímar, veiðu í hálunum o.s.fr.

Henda vitan og tað arbeiði, ið higartil er lagt úr hondum, kann neyvan metast í virði. At talan er um sera viðkomandi granskingartilfar, hava navnframir menn her á landi og uttan úr heimi váttað.

Eysturoyggin er sum kunnugt lokomotivið í føroyskari fiskivinnu, so tað skuldi verið sjálvsagt, at fiskivinnugransking hevur góðar karmar í nærumhvørvinum.

Fyrispurningurin verður settur landstýrismanninum fyri at fáa eina kunning, nú 9 mánaðir er farnir av árinum.

**Á Løgtingi, 28. september 2018**

Kári P. Højgaard